Brunnurin:

# Nú skal gjaldast

*Eirikur Lindenskov*

Brunnanevndin, sum varð vald á aðalfundinum seinast, er nú aftur farin til verka.

Eitt tað fyrsta, nevndin gjørdi, var at gera eina reglugerð fyri Brunnin, har treytirnar eru orðaðar fyri varðveitslu av ellisakførum í Brunninum.

Hóast vit í Brunninum hava til taks 750 fermetrar, so er skjótt at fylla – verður tað ikki gjørt við skynsemi, so endar galið.

Brunnanevndin umsitur nú Brunnin burturav. Nevndin í felagnum hevur einki við Brunnin at gera. Brunnurin hevur eisini sín egna roknskap, sum nevndin fyri Brunnin stendur til svars fyri. Nevndin verður vald á aðalfundi felagsins.

Petur J. Johannesen er kassameistari í Brunnanevndini, og hann hevur sent út rokningar fyri fyrstu mánaðirnar. Um fólk ikki gjalda, so verður akfarið flutt úr Brunninum fyri eigarans rokning. Fyri nýggjar lutir, sum skulu inn í Brunnin, verður sáttmáli gjørdur so hvørt.

Umframt reglugerð og sáttmála, so er tað eisini nevndin fyri Brunnin, sum skipar fyri ólavsøkuframsýningini í ár. Yvirskotið av framsýningini ferð óskert til Brunnin. Saman við leiguinntøkuni skuldi hetta verið gott grundarlag fyri at halda fram við arbeiðinum í Brunninum, sum í fyrstu atløgu verður at fáa Brunnin tættan, síðani at leggja dekk í ein part av Brunninum, har ovara hæddin kann innrættast tl felagshøli, meðan niðara hæddin verður bjálvað soleiðis, at hon kann hýsa akførum, ið skulu standa turt og fjálgt.

Nakað av virksemi hevur verið í Brunninum í vár, eitt nú er ein lyftari settur upp, har tað fer at bera til hjá limum at leiga sær pláss til smáumvælingar.

Í heyst verður arbeiðið í Brunninum tikið uppaftur, og verður tað lagt í fasta legu ávíst tíðspunkt, so limirnir vita, nær arbeitt verður í Brunninum.




*Andreas Djurhuus fekk eina blómuheilsan frá Finnboga Arge, núverandi Opelumboðnum í Føroyum, í sambandi við, at bilurin fylti 25 ár. Andreas verður 95 næstu ferð*

Andrias Djurhuus:

# Næstan 95 og bilurin 25 ár

**Andrias Djurhuus í Havn, vanliga nevndur Diurin, man vera ein av okkara elstu bilførarum. 7. juni fylti bilurin hjá honum, ein Opel Kadett C frá 1978, 25 ár, og sjálvur verður hann 95 ár í januar**

*Magnus Gunnarsson*

Tá Andrias Djurhuus í Havn, Diurin, nú ein dagin fór til sýn við bili sínum, fekk hann ongan kross. Har var einki at finnast at. Við tað at bilurin var blivin 25 ára gamal, bleiv hann skrásettur sum ellisakfar. Hetta ger at gjaldið fyri vegskatt og trygging fer niður í helvt.

Sjálvur er Diurin 94 ára gamal og verður 95 í januar. Hann er ættaður úr Porkeri. Sum ungur sigldi hann, til hann í 1937 yvirtók handilin hjá pápa sínum í Porkeri. Hetta árið giftist hann við Ragnhild, f. Nicodemussen, úr Skálavík. Tey búðu í Porkeri, har tey høvdu handilin til eftir kríggið, tá tey fluttu til Vágs at búgva, har tey eisini høvdu handil. Diurin átti eisini skip og var reiðari, hann átti sjálvur sluppina Selnes. Sluppina Sæborg átti hann saman við øðrum. Í 1970 fluttu tey til Havnar at búgva. Í 1971 keypti hann saman við øðrum ídnaðartrolaran Norðland. Fyrstu árini í Havn arbeiddi Diurin í Skipshandlinum, til hann fekk arbeiði hjá Telefonverkinum, har hann var, til hann varð 75 ára gamal.

## Blómur og dekk

Bilin, ein Opel Kadett C frá 1978, keypti hann 7. juni 1978 frá Eli Klode, sum tá var sølumaður á bilasøluni hjá Vilhelm Nielsen í Jónas Broncksgøtu. Bilurin kostaði 50.000 krónur at keypa. Í sambandi við at bilurin bleiv 25 ár, varð Diurin boðin inn á bilasøluna hjá Meinhardt Arge við Oyggjarvegin, har stjórin, Finnbogi Arge, handaði honum eitt blómutyssi og fýra nýggj dekk til bilin, ið er ein góð reklama fyri Opel. Dekkini ið vóru tikin av eru líka gomul sum bilurin, 25 ár. Tað skal tó sigast at hann hevur eitt sett av vetrardekkum til bilin. So nú er bilurin væl skøddur og Diurin kann koyra nøkur ár afturat. Bilurin hevur bert koyrt 47.000 km. Diurin tók koyrikortið í 1966, tá hann var 57 ára gamal.

# Ólavsøkuframsýningin hjá P/F Wenzel

*Eirikur Lindenskov*

Tað er við vælvild frá P/F Wenzel í Havn – og sjálvandi góðum limum, at Føroya Ellisakfør í ár aftur kann bjóða fólki at síggja gomul akfør.

Framsýningin verður í framsýningarhøllini hjá Wenzel í Havn vikuskiftið fyri ólavsøku og báðar ólavsøkudagarnar.

Tað er ein undirnevnd hjá Føroya Ellisakførum, »Brunnanevndin«, sum skipar fyri Ólavsøkuframsýningini í ár.

– Vit eru sera fegnir um, at teir hjá Wenzel hava verið so beinasamir at vilja hýsa okkum framsýningina, sigur Heini á Borg, sum er formaður í nevndini fyri Brunnin, tá vit hittu hann mánakvøldið. Tá vóru teir við at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar.



Tað eru í ár 100 ár síðani at Ford verksmiðjan varð sett á stovn, og dentur verður tí lagdur á Ford bilarnar á hesi framsýningini.

Nógvir gamlir Ford bilar eru í Føroyum – tann elsti er frá 1915.

Umframt perlur frá 20'unum og 30'unum, so eru eisini fleiri nýggjari »gamlir« Fordar, eitt nú frá seksti og sjeytiárunum.

Hetta er fyrstu ferð, at Ford T lastbilurin hjá Vatnsoyra Bilasavni verður við á framsýning. Hann er nett sama slag bilur, sum tann fyrsti, ið kom til Føroya í 1922 – og sum tann fyrsti, ið kom í Vágoynna í juni árið eftir, í 1923.